# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Fríðrik Kjølbro, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Kanada**, andaðist hóskvøldið, 69 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Jógvan, kunnu lata Zarepta eina penningagávu, konto í penningastovninum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri pápi, abbi, langabbi og oldurabbi

**Hans Jacob Johannesen**
av Sandi
búsitandi í Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum av Lágargarði og úr Frelsunarherinum til hansara seinasta hvíldarstað.
Takk til tykkum øll í Frelsunarherinum, sum stílaðu fyri við ervinum.
Takk til Berg og Njál fyri troystarrík orð, horntónleikin, vakran trio sang og duett.
Ein serlig tøkk til Lágargarð og Miðstovuna fyri tykkara kærleika og umsorgan.

*Fyri tey avvarðandi*
**Vilhelm, Karin og Mads Karlo**

## Merkisdagar



**30 ára føðingardagur**
27. mars fyllir Ruborg Haraldsen, Saltangará, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjókafeini kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Ruborg, kunnu tekna seg á tlf. 310826 ella 256345 áðrenn 23. mars.

**80 ára føðingardagur**
25. feb. verður Selma Heinesen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Brekku 16. Frá kl. 18.

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke, Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

## Prógv

4. februar 2010 hevur Erla Petersen, Fuglafjørður, lokið Bachelor prógv í stjórnmálafrøði (bach. scient.pol) við Aarhus Universitet.

## Dagurin

**22. februar. Pætursmessa.**
So mætur maður sum Pætur hevur tveir minningardagar í álmanakkanum, annar er pætursmessa 22. februar og hin er pætursøka tann 29. juni.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# NePtuN 65 ár!

"Tú trýstir bara á búkin, so hava okur ein tátt aftrat, og so er skráin fullfiggjað!!" Hvussu ofta søgdu antin eg ella Goya-Petur hesi orðini, tá ið vit skiltust seinnapartin nýttársaftan eftir at hava sitið og fyrireikað okkum til nýttársveitsluna um kvøldið?? Jú, í eini 30 ár á rað arbeiddu vit saman um at gera undirhald til fyrst og fremst nýttársveitslurnar, men seinni komu so klubbaveitslurnar, ikki minst veðragildini, og so eisini eina rúgvu av tiltøkum til frama fyri Vágs bóltfelag. Har er vert at nevna tað tiltikna VB-4, har vit vóru við til at savna nógvan pening inn til frama fyri VB-húsið. Tey seinnu árini hevur Arnfinn Thomasen eisini verið við okkum.





Tá ið V-4 hjá útvarpinum fyrstu ferð fór út um Havnina, komu teir suður til Vágs. Hetta var í 72. Niels Petur var sjálvandi klárur við einum tátti:

"Okur eiga nú V-4
Okur hava onga neyð
Og um onnur oss forstýra
So skal Hermann teppa tey!"

Hermann var sjálvandi Hermann Jacobsen sáli, sum jú var primus motor tá við V-4 sendingunum. - Hetta var byrjanin til, at Niels Petur fór at yrkja til hesar sendingar. Nógvir av tættum hansara vóru reinar perlur. T.d. "Prinsessan á Skarvatanga!" - um bretska trolaran "Scottish Princess" ið fór á land á Skarvatanga í februar 1977 og gjørdist vrak. Og so ikki minst tátturin um "Cockrow" - risaskipið ið fór á land á Tvørafirði í januar 1984.

Í yrkingarsavninum "Smátúgvur!" eru einir 90 tættir og sangir. Hetta er sjálvandi bert ein partur av øllum Niels P. hevur yrkt, men hetta vísir tó hvussu fjølbroyttur hann er. Her eru skemtiligar yrkingar, sálmatýðingar, ítróttarkvæður, bygdasangir og mergjaðar fosturlandsyrkingar sum t.d. hetta ørindi úr yrkingini um Vágseiðið:

*"Grovligt skorið út úr landi*
*Vakurt vorðið ,sum av gandi*
*Stendur stint, tá brimið brýtur*
*Sum ein skansi fyri Vág,*
*móti østa havi lítur*
*Vágseið - føgur sjón at sjá."*

Hatta var so bert fyrsta ørindi, men tú kanst lesa restina Í yrkingarsavninum "Smátúgvur!"

Tá ið eg kom at arbeiða í Útvarpi Føroya burturav í tvey ár, var eg fyrst og fremst í Barnaútvarpinum. Eg varð tó eisini settur at gera ymiskar undirhaldssendingar leygarkvøld. - Nógvar av hesum sendingum vóru beinleiðis sendingar úr útvarpshøllini t.d. tá ið útvarpið ella V-4 høvdu rundan føðingardag, føstulávint o. s.fr. Sendingarnar vóru oftast settar saman av smáum leikum, tónleiki og so ikki minst aktuellum tættum. Og har hevði eg hvørja einastu ferð eitt gott og trygt mið. Tað var at ringja suður til Vágs til mín góða vin NePtuN. Og tað svitaðist ikki. Beint áðrenn deadline lógu oftani tveir spildurnýggir tættir í fax-bakkanum.

Góði Niels Petur, hjartaliga vælkomin millum okkum yvir 65. Tillukku við degnum og takk fyri so ótrúliga mangar og góðar løtur saman øll hesi árini og ikki minst eina vón um nógvar ríkar løtur framyvir. "Enn rillar hellan á Gaddi!!" - er gamalt orðafelli í Vági. Enn trýstir tú á búkin, og enn klári eg at trýsta okkurt burtur úr guitarinum.

Vit øll her norðuri ynskja tær og tínum ein góðan dag!

Lat meg enda við einum ørindi úr frálíku yrking tíni "Heimbygdin", sum sigur so nógv:

*Dýrdarløtur á hásummardegi*
*Fast í sál mína hava seg rist,*
*Sólin veitti tær fløva og megi*
*Fjøll og líðir ein perla av list.*
*Fuglur sang í lofti kátur,*
*Merkt av lívsmóti kendist hansar´ flog,*
*Og av ungfólki smittandi látur,*
*Sum av gleði og trivnaði bar boð.*

**RoMBi**

# Syngið við kvøld

Hóskvøldið 25. februar kl. 20.00 skipar Heimaforbundið og Frelsunarherurin fyri einum sangkvøldi saman við brøðrunum Árna og Marnar Andreasen í Frelsunarherinum í Havn.




Innsavnan verður til missiónsarbeiðið hjá Heimaforbundinum. Peningurin fer óskerdur til at hjálpa kvinnum í Bangladesh til at læra at lesa og skriva. Eisini verða tær lærdar at ansa sær viðvíkjandi HIV, AIDS og øðrum sjúkum, eins og at hjálpa teimum at fáa arbeiði so tær kunnu forsyrgja sær og sínum.

Vitjan verður eisini úr Noreg hetta kvøldið. Tað er Brit Knedal oberstlotnantur, leiðari fyri Heimaforbundið í Noreg, Íslandi og Føroyum, sum kemur at siga frá um missiónsarbeiði í Bangladesh og at hava andakt. Fyrireikararnir siga, at øll eru vælkomin til tiltakið og til ein drekkanunn.




*Marnar og Árni Andreasen*